## DAGSINS MEINING

# Málið hvørvur

Vit hava tey seinastu árini verið vitni til eina stóra øking í kostnaðinum av at reka okkara umsiting og stovnar.

Gott hevði verið við einum kjaki um landsumsiting í breiðastu merking. Tað tykist sum um, at alt kjak um effektivisering innan tað almenna verður tagt burtur, bara kostnaðarætlaninar halda. Eingin tykist seta spurnartekin við, bæði eina og tvær eykajáttanir og at hesar kostnaðarætlanir hava nógv størri rakstrarútreiðslur enn fyri fáum árum síðani.

Eitt dømi um hetta er Strandfaraskip Landsins. Stovnurin hevur betýðiligt størri rakstrarútreiðslur í dag enn fyri bert 5 - 6 árum síðani — og tá var skotlandssiglingin íroknað — men eingin tykist siga nakað, tí kostnaðarætlanin heldur aftaná eykajáttanum frá Løgtinginum og øktum inntøkum vegna størri peningumfar í landinum. Alt tos um effektivan rakstur og at avmarka rakstrarkostnaðin og støddina av umsitingini er burtur.

Sami óhepni tendensur er innan miðfyristingina. Miðfyrisitingin er í dag nógv dýrari enn nakrantíð við fleiri fólkum enn nakrantíð, men er hon optimal? Kanska vil onkur halda, men eingin tykist diskutera hetta, so leingi kostnaðarætlanir halda. Kanska átti man bara at gjørt allar kostnaðarætlanir so víðar, at eingin nakrantíð fór útum. Hevði tað verið ein effektivur almennur sektorur?

Hvat siga politikarar um støðuna? Hvat sigur løgmaður? Fullveldisprojektið hongur ikki búskaparliga saman sum er — hevur ein føroysk tjóð ráð til tann almenna sektorin sum er?

Málið má vera at geva skattgjaldaranum ta tænastuna, ið hann hevur fyri neyðini á mest effektivan hátt við ongum óneyðugum rakstrarútreiðslum. Sera óheppið er, um virkisfýsni, nýskapan og effektiviseringsroyndir hvørva, tí einasta mál er at halda eina í nógvum førum alt ov stóra fíggjarætlan. Tað er serliga margháttligt, at almenni sektorurin er bólgnaður meira ennn nakrantíð undir borgarligum løgmonnum.

Ansast má eftir at “fyrr var alt ringt, nú er alt gott og proffesionelt”—hugburðurin ikki forðar fyri konstruktivum kjaki um almenna sektorin. Man má gloyma gamlar fordómar og hyggja at veruleikanum, sum hann sær út aftaná tveimum borgarligum løgmonnum. Pensionistar og heilsuverk høvdu kunnað havt stórt gagn av hvørjari krónu, ið umsitingin og stovnar høvdu kunnað verið fyriuttan. Málið er effektivur rakstur av samfelagnum, og tað má ongantíð hvørva í umsitingarligum sjálvrósi, tí privatiseringsfortalararnir fáa tað alt ov lætt, um samanberingsgrundarlagið verður støðan sum er. Løgmaður nam eisini við privatiseringina í ólavsøkurøðuni. Tað fara vit at venda aftur til.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tað er munur á monnum

**Arbeiða løgtings- og landsstýrismenn veruliga 3 til 5 ferðir so nógv sum Palliba og Marsanna?**

**Finnleif Guttesen**
*Borgarstjóri á Tvøroyri*



Nógv rok er í hesum døgum um eftirlønirnar hjá landsstýrismonnum, og er tað væl skiljandi, tí hetta mál vísir, at løgtings- og landsstýrismenn halda seg vera meira verd enn Palliba og Marsanna.

**Eftirløn**
Tað eru ógvuliga fá fólk, sum í dag kunnu fara úr arbeiði við rímuligari eftirløn, tí hetta hugtakið ”eftirløn” er so mikið nýtt í Føroyum.

Fyri at fáa eina rímuliga eftirløn, sum kann geva 60% av endalønini, skalt tú hava arbeitt í umleið 40 ár og goldið 15-18% av tínari løn øll hesi ár.

**Eftirløn hjá løgtings-og landstýrismonnum**
Løgtingsformaður skal bert sita í 8 ár, so fær hann 60 % av sínari endaløn.

Landsstýrismenn skulu bert sita í 8 ár, so fáa teir eisini 60 % av sínari endaløn.

Løgtingsmenn skulu bert sita í 16 ár, so fáa teir eisini 60 % av sínari endaløn.

Tænastumenn so sum aðalstjórar, deildarstjórar og onnur skulu arbeiða í umleið í 40 ár fyri at fáa 60% av sínari endaløn.

Eftir eftirlønini hjá løgtings- og landstýrismonnum at døma, skulu landsstýrismenn arbeiða 5 ferðir so nógv og løgtingsmenn 2,5 ferð so nógv sum Palliba og Marsanna, og er tað neyvan nakar føroyingur, sum trýr uppá sovorðna arbeiðsorku hjá okkara fólkavaldu politikarum.

**Arbeiði**
Politikarin hevur sjálvur tikið avgerð um sítt arbeiði, so hví í allari víðu verð skal hann hava betri sømdir enn t.d. tænastumenn?

Lønin í dag er rímulig, og ein eftirløn sum hjá tænastumonnum er eisini rímulig, so alt annað tos um eftirløn er bert fyri at fáa meira í egna lumma.

At politikarin skal vera verri fyri at fáa eitt arbeiði, um hann ikki blívur afturvaldur er bert undanførslur og einki annað.

**Nevndir**
Hví skulu nevndir setast fyri at kanna, hvussu lond rundan um okkum gera. Lønartalvan hjá tænastamonnum blívur fylgd, so hví skulu eftirlønarviðurskiftini hjá hesum bólki ikki eisini ikki eisini blíva fylgd av løgtings- og landsstýrismonnum?

Ella er politikarin so nógv meira verdur enn Palliba og Marsanna?

# Vónloysið ongantíð vunnið á føroyingum

**Strembanin eftir at fáa tilfeingið til høldar hevur altíð verið sterkari enn tað mótloysi, sum mangan hevur tyngt føroyingin, segði Bjarti Mohr millum annað, tá hann setti ólavsøkuna**

RØÐA
*Eyðun Klakstein*

– Strembanin eftir at fáa tilfeingið til høldar hevur altíð verið stór í Føroyum. Fjøllini verða gingin, lendi verða velt, og sjógvurin verður troyttur, hóast tað ikki altíð er tespiligt at verða á veiðiferð undir Føroyum.

– Strembanin eftir at fáa tilfeingið til høldar hevur altíð verið sterkari enn tað mótloysi, sum mangan hevur tyngt føroyingin. Og tað er hendan strembanin, sum byggir land og er grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum.

Hetta segði vinnulívsmaðurin og politikarin, Bjarti Mohr, millum annað, tá hann setti ólavsøkuna leygardagin.

– Hesa stremban síggja vit eisini aftur innan okkara ítróttar- og mentanarlív. Ítróttarfólk seta sær hægri mál og royna at náa einum úrsliti. Og vit eru komin væl ávegis í hesum kappingum.

– Og sanniliga gleða vit øll, tá tað gongur okkara ítróttarfólki væl í altjóða kappingum, segði Bjarti Mohr og nevndi góðu úrslitini hjá ÍSB-svimjarunum í paraolymisku leikunum.



*Strembanin eftir at fáa tilfeingið til høldar byggir land og er grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum, segð Bjarti Mohr, tá hann setti ólavsøkuna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Silvurmerkið er ósigur

**Prædika, sum Hans Eiler Hammer helt Ólavsøkudag**



Bøn: *Ævigi Guð, vit takka tær fyri, at tú kallaði lærusveinar tínar og grundaði kirkju tína her á fold. Vit takka tær fyri, at tú enn tann dag í dag vilt brúka okkum veiku og syndigu menniskju í tænastu tíni. Hjálp okkum til at tæna tær við evnum og náðigávum okkara, soleiðis at vit kunnu byggja kirkju tína á hin eina sanna grunnvøll!*
*Amen*

Hetta heilaga evangeliið til Ólavsøkudag skrivar Matteus evangelistur í 16 kapitli, ørindini 24 - 27 og tað ljóðar so í Jesu navni.

Heilagi Faðir! Vit takka tær fyri títt heilaga orð til okkara í dag. Orð títt er sannleiki, læt tað vísa okkum vegin til sannleika og til sælu. Amen.

## Silvurmerkið er ósigur.

Hesi orðini eigur hin vælkendi norksi skoytukongurin Knut Johannessen, ella betri kendur sum ”Kuppern”. Hann hevur vunnið eitt ótal av heiðursmerkjum, bæði undir EM, HM og OL. Í 1963 bleiv hann samanlagt nr. 2 undir Heimsmeistaraskapinum hetta árið. Eftir lokna kapping bleiv hann spurdur, um hvat hann helt um sítt egna avrik og svaraði hann tá: Silvurmerkið er ósigur!

Ja, hetta er ivaleyst tann sama kenslan mong ítróttarfólk sita við, eftir at tey hava gjørt sítt ýtasta fyri at vinna. Í gjár stóð kappróðurin á skránni. Bátarnir komu stavn um stavn inn eftir vánni. Ella sponn fyri sponn, sum frásøgumaðurin tók til. Men fyri hvønn róður var tað bert ein vinnari — gullvinnarin. Hinir vóru í grundini allir taparar, sjálvt um teir bert vóru skutin aftanfyi og sjálvt um allar bátsmanningarnar gjørdu sítt ýtasta! Og í steypafinalunum, bæði hjá kvinnum og monnum, ið verða leiktar seinni í dag, kann bert ein vinnari finnast. Hjá tí tapandi liðinum vil silvurmerkið upplivast sum ein ósigur! Soleiðis er nú ítróttarin blivin. Soleiðis er ítróttar-heimurin skipaður!

Men vit eru øll eisini við í eini kapping, sum vit ikki sjálvi hava valgt at verða við í. Vit eru sett inn á kappingarbreytina. Allastaðni kappast vit — í skúlanum, á arbeiðsplássinum, í samfelagnum sum heild. Vit berjast fyri at smábygdir skulu yvirliva, men tær doyggja út, uttan at vit fáa gjørt nakað fyri at forða tí. Hetta kennist fyri mong sum eitt stórt tap, serliga tá virðir fara fyri skeytið, uttan at ein sjálvur klárar at steðga hesum. Tað eru kappingar millum lond og fólk. Allastaðni finna vit taparar — taparar, ið líða. Líða vegna sjúku, ið bráddliga rakar ein sjálvan uttan at ein sjálvur klárar at forða hesum. Taparar ið líða vegna arbeiðsloysið, vegna peningaligar trupulleikar osfr. Ja, allastaðni hvar vit venda okkum í samfelagnum finna vit taparar!

Men eingin av okkum er tann stóri taparin. Tí tað er ein, ið er størri tapari enn nakar av okkum — og tað er Jesus. Hann mátti líða tann stóra ósigurin. Hann mátti niður á dýpið, á botnin. Og tað hendi í tí løtu hann rópti á krossinum: ”Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær?” Eitt hjartaskerandi róp! Men eingin svarði honum. Himmalin var sum stongdur fyri honum. Kvirran er verri enn deyðin. Eingin svarar honum uppá hetta rópið. Enntá Guð, Faðir hansara er tigandi. Púra einsamallur stríðist hann, MEN TÒ: er hann lýðin Faðir sínum og fullførir frelsuverkið! Og tí blívur hann eisini bønhoyrdur av Faðir sínum, ið hann rópar á!!

Eingin okkara kann tí falla djúpri enn tað sama. Tí tað er á botnium at vit fáa at uppliva at tað er ein miskunnsamur og kærleiksfullur føvningur undir okkum. Tað er ein, ið altíð vil royna at fáa okkum longur upp! Nevniliga hann, sum er aftastur. Hetta er gott at vita sær!!

Men tað steðgar ikki her. Tí hin aftasti, tann stóri taparin, er samstundis hann, ið kvettir bandið á málinum. Tað er hann, sum seinni verður bønhoyrdur og sum stendur við upplyftum hondum á sigurspallinum. Tað er hann, sum tekur tey við sær, ið einki orkað av sær sjálvum!! Ein veldigur boðskapur. Frá Hjartaskerandi rópi, frá háan og spottan, frá misnýtslu og húðfleingjan, til TRIUMF og sigursróp!!!

Tí er tað at vit í dag við frímóði kunnu bera krossin aftaná Jesus, vælvitandi um, at tað eisini hevur sínar fylgir, um ein sigur JA til at bera krossin!

Tí tað at verða ein Kristi krossberari, merkir at geva honum ræði yvir lívi sínum! Ja tað merkir at siga deyðadómin yvir seg sjálvan, yvir sína sjálvgleði og yvir sín stoltleika!

Kallið til at fylgja Jesusi eftir fær tí bert meining í ljósinum av tí, ið Jesus sjálvur hevur gjørt fyri okkum ígjøgnum líðing og deyða sín! At fylgja honum, er ikki bert at verða ein lærusveinur og at ganga í skúla hjá honum. At fylgja honum er heldur ikki tað sama sum at siga, at tað er mær nóg mikið at eg ein dag bleiv doyptur og konfirmeraður!

Nei, tað er ikki nóg mikið at siga Harri, Harri, um vit ikki vilja gera tað, ið hann sigur og ganga tann vegin hann vísir okkum á, sjálvt um tað í síðsta enda kann føra til deyða!

Vit eru kallaði til at verða sannir Kristmenn, til at verða sannir krossmenn!

Lat tað verða undirstrika henda Ólavsøkudag, at tað at verða ein sannur krossberari er ikki tað sama sum at hava eina meining um hin krossfesta og upprisna Jesus Kristus! Nei, sigur Jesus. Um vit skulu vinna sigurin — hin æviga sigurin, so mugu vit fyrst tapa, tvs. siga nei til okkum sjálvi og alt okkara. Tí tað at játta Jesus sum frelsara, merkir samstundis at hann fær ræði á lívi okkara, at alt okkara egna má víkja fyri hansara vilja!

Vit eru von við at siga, sum vit eisini byrjaðu við, at eitt tap er eitt tap, ein vinningur er ein vinningur.

Hjá Jesusi er tað heilt øvugt. Hann sigur, at vinningurin er eitt tap — tapið er ein vinningur. Tað merkir, at um vit skulu fáa sigurskransin, so mugu vit tapa valdið á okkum sjálvum og á okkara egna lívið. Gera vit tað, so vinna vit lívið í Jesu frelsandi felagsskapi. Tá vil krossurin blíva skiftur út við krúnuna!

Hetta er av alstórum týdningi at vit menniskju skilja og geva gætur eftir.

Tí tað snýr seg, fyri hvønn einstakan av okkum, um tað æviga lívið, frelstur um ævir frá ævigum deyða og glatan. Tí tað finst nevniliga ein annar møguleiki, og tað er at tapa lívið á mállinjuni. Tí tað er bert tann, ið heilt og fullt hevur givið sítt lív til Jesus Kristus, ið fær sigurslønina tá menniskjusonurin kemur!

Fyri nøkrum árum síðani var ein sera viðkomandi frásøga í tí norska sjónvarpinum. Ein frásøga, ið setti síni spor hjá teimum flestu í sóðu hesa. Ein tíðindakvinna kom saman við fleiri øðrum gangadi framvið eini tjørn ið var dekka av ísi. Bráddliga fáa tey eyga á ein lítlan drong, ið er farin ígjøgnum ísin. Tíðindakvinnan sleppir øllum hon hevur í hondunum og fer at hjálpa hesum neyðars drongi. Sjálvt um drongurin var um at drukna og frysta til deyðis, so vildi hann ikki sleppa einum luti hann hevði í hondum sínum. Hesin lítli lutur var ein gáva til hansara kæru foreldur. Ein gáva, ið hann hevði gjørt í skúlanum. Sjálvt tað løtuna hann lá í deyðsvanda vildi hann ikki sleppa hesi gávu. Hann var tilreiðar at missa lív sítt við hesi gávu í føvningi sínum!

”Tí at tann, ið vil bjarga lívi sínum, skal missa tað; men tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal finna tað!”

Fylgjan av at verða ein Jesu krossberari, av at játta Jesus sum sín Harra og Frelsara, er at missa lív sít!

Pætur, ið hesi orðini m.a. er søgd til, segði eitt nei til krossin. Hann segði eitt nei til Jesu líðing. Ja, hann flýggjaði enntá frá sínari egnu líðing. Á henda hátt var hann ein av okkum. Men Jesus var og er øðrvísi. Jesus stóð óvikandi fastur uppá uppgávu sína. Hann stýrdi ímóti málinum, ímóti krossinum fyri at bjarga f´ólkinum.

Hesin lítli drongurin, sum var um at drukna, krøkti seg fastan í tann lítla lutin hann hevði í hondum sínum.

Eisini vit fáa loyvið til, av Guðs stóru náði, at krøkja okkum fast um Jesus í hjálparloysi okkara og halda fast í honum, sjálvt um vit eru óverdigir syndarar. Vit fáa loyvið til hetta, tí at hann longu hevur sagt ja til okkum syndarar.

Lat meg tí enda við tí vælkenda sálmanum:

Lat verøld meg háða og aga, lat tornarnar stinga og naga, lat lakið tey yvir meg breiða, eg rósuna altíð vil eiga!

Amen.

Latum okkum øll biðja:

Lov og tøkk og allur heiður veri tær, Guði várum, faðir, syni og heilagum anda, sum altíð hevur verið, er og altíð verður ein sannur tríeinigur Guð, hálovaður frá fyrsta upphavi og um allar ævir.

Vit biðja teg, himmalski faðir okkara, um at tú má verða hjá okkum øllum við náði og hjálp tíni. Verð hjá øllum teimum, sum hava tað ringt og eru stødd í neyð, veit tú teimum hjálp frá tær. Troysta øll tey, ið syrgja, ja síggj í kærleika til faðirleys og móðurleys, til einkjur og einkjumenn og ver hjálpin hjá øllum teimum, sum ongan góðan eiga.

Vit biðja fyri børnunum og teimum ungu. Halt tú tey á lívsins rættu og góðu gøtum. Harri, styðja og styrk tey gomlu gev tú teimum í friði og náðum at leggja frá sær, tá teirra tími kemur. Hjálp so okkum øllum soleiðis at vit verða varðveitt í trúnni á teg. Leið tú okkum við tíni náðigu hond eftir lívsins vegi, so at vit at enda mega fáa ein gleðiliga uppreisn!

Vælsigna tú, faðir, tað fólk sum kemur saman um orð títt um allan heimin, og eisini í fólki okkara. Hjálp okkum øllum at goyma orð títt í hjørtum okkara.

Halt tína sterku hond yvir sjófólki okkara, varðveit tú teir og før teir aftur í øllum góðum.

Vegleið tú teir, sum tú hevur sett til at stýra og ráða, eisini her heima á landi. Her hugsa vit serliga um løgting og landsstýrið bygd og býráðir og kirkjunnar leiðslu, bæði biskup og próst. Vælsigna og varveit eisini allar orðsins tænarar!

Vælsigna og varðveit drotning okkara, og alt hús hennara.

Fylg okkum so á øllum leiðum okkara, og hjálp okkum til altíð at fylgjast við tær. Tað biðja vit teg um í Jesu navni.

Amen!